# Í Sundalagnum ein sóljudag

Triðja hvørt ár eiga hósvíkingar túrin at skipa fyri Sundalagsstevnuni.

Hesa seinastu tíðina hevur nógv verið gjørt fyri at skipa so fyri, at bygdarfólkið og tey vitjandi skulu fáa eitt so gott vikuskifti sum tilber.

Skráin fyri stevnuna er prentað í blaðnum í dag, eins og vit hava ein hóp av tilfari úr og kring um stevnubygdina.

Hóast skráin er meiri skerd enn upprunaliga ætlað, so er kortini talan um eina áhugaverda skrá.

Stevnan verður sett leygardagin kl. 14, tá Heðin Zachariassen, borgarstjóri í teirri samanløgdu Sunda kommunu fer at seta stevnuna. Við hetta høvið spælir eisini GHM.

Hvat veðrinum viðvíkur, so er bert eftir at vóna at tað verður øllum til vildar – serliga hjá teimum, sum skipa fyri tiltøkum uttandura, men eisini hjá teimum mongu stevnu-gestunum.

Góða Sundalagsstevnu 2005.



*Hósvíkingar bjóða til stevnu um vikuskiftið, og hava lagt eina avmarkaða, men kortini áhugaverda skrá til rættis*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Út har blómurnar vaksa

**Teir elstu næmingarnir í Hósvíkar skúla hava sín egna tíma, har teir seta tímatalvuna eftir tí, sum teir sjálvir halda vera áhugavert at gera inni og úti**

UNDIRVÍSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hósvík:** - Tað er bara super at sleppa út úr skúlastovuni eina løtu.

Teir 15 elstu næmingarnir í Hósvíkar skúla møttu sum vanligt í skúlanum mánadagin. Sambært tímaætlanini skuldi tey hava tvær av kravdu lærugreinunum fyrst, áðrenn tann tímin kom, sum mong teirra munnu gleða seg nógv til ein mánamorgun: Felagstímin.

Tveir teir fyrstu tímarnar høvdu tey havt danskt og síðani ein tíma í søgu. Men tá komið var út á fyrrapartin kom so felagstímin, har næmingarnir sjálvir sleppa at avgerða innihaldið í tímanum.

Hóast veðrið ikki var av tí allarbesta, so valdu tey kortini at fara út fyri dyr. Tað var yvirskýggjað, nakað av vindi, men kortini turt.

So her var bara eitt at gera: Fara út fyri skúladyr og oman í bygdina.



*Gott er at vera í skúla, men einki er sum at koma út um eina løtu. Tað halda í øllum førum næmingarnir í 5., 6. og 7. flokki í Hósvíkar skúla. Teir eru hesir - aftast vm.: Anna Herla í Kálvalíð (7. fl.), Anita Joensen (6), Sóley Samuelsen (5), Jóhanna Klein Olsen (7), Anna Sømark (6), Torkil Djurhuus (7), Turið Clementsen (6), Martin í Brekkunum (6), Marius Høgnesen (6), Magnus Joensen (6), Marni Joensen (5) og Teitur Lykke Mikkjalsson (5). Fremst vm.: Sarita Joensen (5), Guðrun Durhuus (5) og Amanda Jensen (5). Við á myndini er eisini Elna Sømark, sum hevur verið læraravikarur í Hósvík seinastu tvey árini, men sum nú hevur søkt um at sleppa inn á Læraraskúla*

## Skiftandi felagstími

Í hesum felagstímanum fyri 5., 6. og 7. flokk, sum allir eru í somu stovu, eru tað næmingarnir sum seta tímatalvuna.

Tey hava tykist við mong ymisk ting í hesum tímum. Onkutíð hava tey spælt spøl, sum tey sjálvi hava tikið við heimanífrá, og til aðrar tíðir hevur onkur góður filmur verið á skránni.

Men mánadagin í hesi vikuni var altso avgerð tikin um at fara oman í bygdina ein túr.

Eins og so nógva aðrastaðni so er tað tann guli liturin frá sóljuni, sum setur sín serliga dám á tær grasgrønu fløturnar í bygdini. Og hví ikki fara oman at heinta nakrar av teimum, samstundis sum ein fær fríska luft og sleppur út úr skúlastovuni eina løtu?

Sum sagt so gjørt. Vit møttu teimum, meðan tey øll vóru upptikin við at heinta hesa vøkru blómu, sum flest hava ynskt sum tjóðarblómu okkara.

Eftir hesa løtuna uttanfyri fór flokkurin niðan aftur í skúlan. Nú skuldi flokkurin býtast sundur í tvey - genturnar skuldu hava tónleik í Hósvíkar skúla, meðan dreingirnir fóru til ítrótt í skúlanum á Oyrarbakka.